# DVD-útgáva á fimm tungumálum

Í hesu vikuni koma tvær nýggjar DVD-útgávur á marknaðin frá Studio Pegasus. Tað eru filmirnir hjá Trølla Pætur samtakinum "Jólini hjá Trølla Pætur" og "Trøllini og Mafian"

"Jólini hjá Trølla Pætur", ið er ein hugnaligur jóla-familjufilmur er ikki áður komin út á DVD, og fólk hava spurt nógv eftir hesum filmi á DVD, síðani hann kom út á VHS fyri 4 árum síðani.

Við góðum stuðli frá Vinnuframagrunninum varð fyri tveimum árum síðani farið undir at umseta søgugongdina í filminum "Trøllini og Mafian", har endamálið var, at leggja frásøgurøddir um filmsgongdina inn á filmin, so eisini børn í øðrum londum kunnu fáa gleði av hesum, í Føroyum, so vælumtókta barnafilmi.

Úrslitið bleiv so, at frásøgan varð umsett til danskt, norskt, íslendskt og enskt. Frásøgufólk hava síðani verið í upptøkuhølunum og lisið frásagnirnar inn, ið síðani eru kliptar inn í filmum á hesum tungumálum. T.v.s. at tá ein setur filmin í gongd, so kann veljast ímillum hesi málini, - umframt føroyskt sjálvandi.

Mennirnir aftanfyri Trølla Pætur halda, at tá so stórur partur av børnunum í Føroyum hava tikið filmin til sín, so eiga børn í londunum uttanum okkum eisini at fáa møguleikan fyri at njóta gott føroyskt barnaundirhald.

Tað er Studio Pegasus, ið gevur út, og filmirnir verða at fáa í krambúðunum frá hósdegnum.



















